# Starvsvenjing

9. og 10. flokkur í framhaldsdeildini eru hvørt ár til starvsvenjing, har tey ynskja at vera í tvær vikur. Har fáa tey møguleikan at royna seg í størvum, tey ætla sær at starvast við, tá ið tey verða vaksin. Tað er ein sera góður møguleiki fyri ungfólk, tí so fáa tey, ikki bara ein, men tveir, møguleikar at síggja, hvussu tað í roynd og veru er at starvast í gerandisdegnum. Hettar er sera lærurikt og spennandi.

Vit eru tveir starvsnæmingar, ið hava verið til starvsvenjing í miðlahúsinum seinastu tvær vikurnar. Vit hava skrivað tíðindi á portalin, lagt ynskiløtuna til rættis, verið á bygd og fylgt við samrøðum til oyggjablaðið, og nú gera vit eina grein um starvsvenjing. Vit hava ígjøgnum vikuna havt samrøðu við tríggjar starvsnæmingar, ið ganga í NámX. Tey vóru spurd um, hvat tey dámdu við sínum starvi, og hvat tey gjørdu.

## Guðrið Jákupsdóttir 16 ár Landssjúkrahúsið

Vit hava tosað við Guðrið ígjøgnum telefon og verið á sjúkrahúsinum og lurta eftir, hvat hon hevur havt at siga. Vit spurdu hana, um hví hon hevði valt at starvast á Landssjúkrahúsinum. Hon svaraði, at hon vil vera skurðlækni, tá ið hon verður vaksin, og at tað er sera áhugavert.

Hon skiftir deild annan hvønn dag, og tá ið vit tosaðu við hana, var hon á føðideildini. Hon skal ígjøgnum næstan allar deildirnar, men nakrar eru undantøk. Hon sleppur til dømis ikki á barnadeildina.

Hon forkláraði okkum sera nógv um nógvar deildir og vísti okkum runt í rúmini. Hon kennur væl til Landssjúkrahúsið, tí hon var til starvsvenjing sama stað, tá ið hon gekk í 9. flokki.

Hiðaril hevur hon trillað sengur, verið í røntgeni, hjá portørinum, hugt eftir sjúkrabilinum, og nú er hon so í føðideildini. Hon skal eisini á G8. Hon sleppur ikki at gera alt, men eisini hevði hon viljað sæð eina ordiliga skurðviðgerð og út at koyra við sjúkrabilinum. Tó sleppur hon at síggja onkran lítlan skurð.

Vit spurdu hana eisini, um tað var nógv at gera. Hon segði, at tað var ymiskt. Tá ið nógv fólk skuldu til MR- og CT-skannaran, skuldi hon trilla tey aftur og fram.

Vit spurdu til endans, hvussu starvsfólkini høvdu tikið í móti henni, og hon svaraði, at tey ikki høvdu kunnað gjørt tað betur.

## Ragnhild Petursdóttir Østergård 16 ár Djóralæknatænastan

Tá ið vit ringdu til Ragnhild, var hon júst komin heim. Vit spurdu hana, um hvussu tað gekk á hennara arbeiðsdegi, og svarið var, sum væntað, gott. Vit spurdu hana eisini, um hvat hon gjørdi í starvsvenjingina hjá sær. Hon hyggur at, tá ið djóralæknin ger skurðviðgerðir, og hon hevur lært at geva djórum sproytu. Síðan spurdu vit, hvat var mest spennandi. Tá svaraði hon, at tað, ið var mest spennandi, var tá ið ein seyðarhundur skuldi hava keisaraskurð. Hon helt, at tað var mest spennandi, tí at hon hjálpti til við skurviðgerðini. Tó sleppur hon ikki at gera tær heilt stóru viðgerðirnar, tí at økið er sera eymt. Hóast alt hevur hon givið nøkrum hundum og kettum sproytur og væntaði sjálv, at hon ikki fór at klára tað serliga væl. Men tað gekk væl hjá henni, sigur hon. Hon heldur, at Djóralæknatænastan er eitt sera lærurikt starvspláss.

Grundin til at hon valdi hettar starvsøkið er, at hon væl hevði kunnað hugsað sær at verið djóralækni, tá ið hon verður eldri, sum pápi hennara.

## Rut Brend 17 ár og Súsanna Lamhauge 16 ár Smyril Line

Tað sleppa hægst fýra næmingar við í Norrønu, og tað eru altíð sera nógv, ið velja tað. So tað verður lutakast um, hvør sleppur við, og tá skalt tú hava eydnuna við tær. Og tað høvdu Súsanna, Rut, Høgni og Hermann. Vit fingu eitt lítið tíðarskeið at ringja til næmingarnir umborð á Nørronu. Hóast hetta bara vóru fittar fimm minuttir, fingu vit nógv at vita um teirra túr. Tá ið vit prátaðu við tær, vóru tær júst komnar heim frá Íslandi og vóru áveg til Danmarkar.

Vit spurdu tær, hvat tær høvdu gjørt.

Tær høvdu verið fleiri støð á skipinum, til dømis høvdu genturnar ruddað í øllum bátinum, og seinni skuldu tær í køkin at dekka borð og at gera klárt til kokkin at gera mat. Vit spurdu, hvat tað var at gera klárt til kokkin. Tað var at skera grønmeti og gera reint. Dreingirnir høvdu spulað dekkið og seinni skuldu teir eisini í køkin.

Vit spurdu eisini, hvussu nógv tær høvdu fingið burturúr, og genturnar hildu, at higartil høvdu tær ikki lært nakað, tey ikki vistu um áðrenn. Tó hoyrdu vit dreingirnir svara aftan fyri, at teir høvdu fingið nakað burturúr. So tað var ymiskt.

Tær fortaldu okkum síðan, at starvsfólkið hevði tikið væl ímóti teimum og verið lagalig, jalig og sera smílandi. Sjálvt um næmingarnir ein dagin lógu inni í seingini við sjóverki, skilti manningin tað væl, og lótu tey slappa av í ein dag.

Seinast spurdu vit tær, hví tær høvdu valt at farið við Norrønu, og um tær kundu hugsað sær at arbeitt har, tá ið tær vóru vaksnar. Tí vóru tær ikki heilt vísar í og fortaldu okkum, at tær hildu tað vera sera spennandi at velja Norrøna sum starvsøki, tí tú sleppur útum landoddarnar.






